

*Sum støðan var, so er einki at ivast í, at Pól var besta boðið til vinstra bakkin, men tað er í høgra verjuborði, at hann eigur sítt pláss á liðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Óvant í støðum

**Tveir leikarar fingu fyri fyrstu ferð altjóða minuttir á vøllinum í dystinum á Hampden Park. Sum heild má avrikið sigast at vera góðtikið, men hjá summum leikarum var talan um óvandar leiklutir, sum settu sín dám á avrikið**

LEIKARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*

**1. Jákup Mikkelsen (Partick Thistle)**
Hevði úr at gera, nú hann skuldi prógva sínar dygdir fyri skotsku tjóðini, og fyri tað mesta slapp hann eisini væl frá hesum. Møguliga kundi hann staðið seg betur við seinna skotska málið, men kann sum so ikki lastast fyri hetta. Og við fleiri bjarginum aðrar tíðir í dystinum var hann í øllum førum viðvirkandi til, at fleiri mál ikki komu ígjøgnum.

**2. Jann Ingi Petersen (B68)**
Var sum neyðloysn fluttur aftur á høgra bakk, og tað var eyðsæð, at hetta ikki var ein leiklutur, sum hann treivst so øgiliga væl í. Stríddist sum vant sera væl, men hevði trupulleikar við at standa rætt á vøllinum, og hesin ótryggleikin viðførdi eisini, at hann ikki var eins nógv við í framrættaða spælinum, sum tað hevði verið ynskiligt. Valið av honum boðar tó frá áliti frá venjarunum, og tað er heldur einki at ivast í, at hann eisini er partur av hópinum framyvir.

**4. Pól Thorsteinsson (B36)**
Noyddist enn einaferð yvir á vinstra bakk sum vikarur, og tað kundi enn einaferð staðfestast, at hetta ikki er besta pláss hansara. Hevði serliga fyrstu løtuna stórar trupulleikar av kvika Paul Devlin, men spakuliga fekk hann tó alt betri tak á hesum. Sum støðan var, so er einki at ivast í, at Pól var besta boðið til vinstra bakkin, men tað er í høgra verjuborði, at hann eigur sítt pláss á liðnum.

**5. Jón Rói Jacobsen (Brøndby IF)**
Hevði saman við Óla Johannesen eina sera trupla uppgávu, tá skotar skuldu haldast burtur frá málinum. Fyri tað mesta gekk tó væl at tetta holini í føroysku miðverjuni, og tað var sjáldan, at skotar komu til møguleikar, tá spælt varð eftir miðásini, tó at 2-1 málið kom eftir júst hesi uppskrift. Var eisini við í framrættaða spælinum, og hevði í seinna hálvleiki eitt av sínum raidum niðaneftir, uttan at hetta tó gav úrslit.

**6. Rógvi Jacobsen (HB)**
Bara tað at Rógvi til yvirmát kundi dystast við skotska luftvápnið sigur eitt sindur um, hvussu stóran týdning hann hevur fingið í føroyska spælinum. Við kropsstyrki sínari var hann heldur ikki lættur at flyta hjá teimum, og eisini megnaði hann væl at taka lut í spælinum í borðunum. Enn restar tó nakað, áðrenn hann í nóg stóran mun fær tikið lut í bóltspælinum longur inni á vøllinum.

**7. Fróði Benjaminsen (B68)**
Týdningurin hjá Fróða fyri føroyska liðið má sigast at vera indiskutabul, og aftur hesa ferð var hann leikarin, sum stýrdi føroyska spælinum. Kropsliga styrkin lat eisini mangan skotan liggja moyran á vøllinum, og enn tykist hann ikki kenna til tað, at hava virðing fyri sterkari mótstøðu. Dregur tó skeiva vegin, at hann fekk sær eitt heldur óneyðugt gult kort við eini harðari eftirtackling.

**8. Julian Johnsson (ÍA Akranes)**
Var sum ikki einaferð motorurin á miðvøllinum, og saman við Rógva var hann eisini leikarin, sum kundi bjóða skotum av í luftspælinum. Ikki minst við deyðbóltsstøðum, har tað eisini eydnaðist honum at gera føroyska málið. Tóktist tó at hava mist nakað av luftini eftir steðgin, og var tí ikki eins eyðsýndur her, men royndi tó alla tiðina at bjóða seg fram til luttøku í føroyska spælinum.

**9. Jákup á Borg (B36)**
Við perfekta hornasparkinum sýndi hann enn einaferð, at hann meira enn nakar er maðurin, sum leggur upp til føroysku málini. Men hann mundi tó iðra seg um, at tað ikki eydnaðist honum at skora, tá støðan framvegis var 0-0. Kom annars væl frá uppgávuni, tá hann at byrja við varð royndur frammi í fremstu røð, og var sum vant sera arbeiðssamur á miðvøllinum, tá hetta var leikluturin eftir steðgin. Hevði eisini eina góða fríspárksroynd, sum tíverri streyk beint framvið.

**10. John Petersen (B36)**
Var maðurin, sum skuldi samanbinda føroyska álopsspælið, men tað var avmarkað, hvussu nógv hann fekk loyvi til í hesum. Hevði risastóra Andy Webster sum persónliga ansara í stórum pørtum av dystinum, og fekk tí sjáldan gjørt nakað við bóltin, um hesin ikki varð spældur beint á. Hevði tó einstakar góðar detaljur, og megnaði fleiri ferðir at skapa bæði sær sjálvum og øðrum pláss.

**11. Helgi L. Petersen (NSÍ)**
Var sera óvæntað valdur sum maðurin, ið skuldi byrja í føroyska álopinum, men livdi fult upp til álitið. Tað var kanska avmarkað, hvat spurdist burturúr av málmøguleikum, men hann arbeiddi sera væl fyri sakini, og fekk soleiðis staðfest, at hann á ongan hátt er eigur at gloymast burtur, tá landsliðshópir skulu veljast framyvir.

**13. Óli Johannesen (TB)**
Var saman við Jón Róa Jacobsen hjartað í føroysku verjuni, og sæð burtur frá 2-1 málinum, so var miðverjan fyri tað allarmesta sera tøtt. Við kropsligu styrki síni var Óli ofta í hornatøkum við mótstøðumenninar, og at teimum ikki altíð líkaði hetta eins væl, tóktist sjónligt, tá tað í seinna hálvleiki fleiri ferð kom til smærri samanbrestir millum Óla og álopsleikarar hjá skotum. Føroyski liðskiparin megnaði tó alla tíðina at halda høvdinum kalt, soleiðis at býttar frustratiónir ikki komu at kosta óneyðuga nógv.

**14. Atli Danielsen (KÍ)**
Slapp at royna seg seinastu fimm minuttirnar fyri Julian Johnsson, og er grundarlagið til eina meting tí alt ov lítið. Fekk tó eitt sindur av altjóða royndum við hesum, og tær kunnu so bara koma honum til góðar framyvir.

**17. Tór-Ingar Akselsen (HB)**
Seinasti maðurin, sum varð kallaður inn til hópin, var hin fyrsti, sum slapp av skiftisbeinkinum, tá Helgi var um at gerast dekan ov moyrur. Við kvikleika sínum fekk Tór-Ingar eisini skapt nakað sum líktist føroyskum álopsspæli. Ikki minst tykist bóltmóttøkan at vera góð, soleiðis at ferðin á spælinnum ikki dovnar.

**18. Christian Lamhauge Holst (Lyngby BK)**
Gjørdist næsti maðurin, sum fekk debut á ferðini, tá hann seinastu lítlu løtuni loysti Jákup á Borg av. Var tó avmarkað, hvat hann fekk víst hesa tíðina, og kann tí ikki metast.



# Helgi fekk møguleikan

**Eftir at hava bíða í eini 6-7 ár, slapp Helgi L. Petersen leygardagin at ganga inn sum ein av teimum fyrstu ellivu á føroyska fótbóltslandsliðnum**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*



*- Eg fekk tað vita kvøldið fyri dystin, so eg kann gott siga, at eg svav ikki heilt so gott sum vant leygarnáttina, helt Helgi L. Petersen, um møguleikan, sum loksins kom*

**Glasgow:** Av broytingunum, sum vórðu gjørdar í føroysku uppstillingini undan dystinum leygardagin, var tann mest óvæntaða helst, at Helgi L. Petersen hesa ferð fekk møguleikan frá fyrsta bríksli.

Helgi hevur annars verið í landsliðsmyndini heilt leingi, men hetta var fyrsta ferðin, at hann veruliga fekk møguleikan, at hetta tóktist hann eisini fegin um, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin.

- Eg fekk tað vita kvøldið fyri dystin, so eg kann gott siga, at eg svav ikki heilt so gott sum vant leygarnáttina. Sjálvandi visti eg av, at møguleikin kanska var betri, nú Christian Høgni ikki var við, men har eru jú fleiri um boðið, so tað var eitt sindur óvæntað.

Og tað var ikki eiti á stað at byrja. Størsta fjøldin, sum føroyska landsliðið nakran tíð hevur spælt fyri, stóð klára at taka ímóti, og tá tjóðsangirnir vórðu leiktir, stóð púra greitt, at Føroyar vóru tann lítli í hesum spælinum.

- Ja, men tað var framvegis ein deilig kensla at standa har. Akkurát hvussu teir royndu at gera burturúr, royndi eg bara at hugsa sum minst um, so tað var ikki nakað, sum ávirkaði okkum á vøllinum. Men hatta var eitt flott show hjá teimum. Tað er heilt vist.

# Tit vóru betri

**Tað fall í góðar skotska jørð, at Henrik Larsen rósti spælinum hjá mótstøðuni**

VENJARIN
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Glasgow:** Henrik Larsen líktist ikki nøkrum tapara, tá hann trein inn til tíðindafundin eftir dystin. Vælupplagdur greiddi hann skotum frá, hvussu hann hevði sæð dystin, og ikki minst fall tað í góða jørð, at skotar fingu nakrar rósur frá føroyska venjaranum.

- Um dystin sjálvan haldi eg, at hann varð avgjørdur, tá tit skora til 2-1. Tá hava vit arbeitt okkum inn í dystin, og vit javnaðu eisini leiðsluna, so tað var ein ordans frammaná hjá okkum at fáa, helt hann fyri.

- Eftir tað komu vit ongan tíð rættiliga fyri okkum, men eg eri væl nøgdur um avrikið. Leikararnir hjá okkum arbeiddu sera væl, og sjálvt um tað aftur hesa ferð bara var nær við, so eru nógv góð ting, sum vit kunnu taka víðari við okkum.

Og spurdur, hvørt hann kendi seg snýttan fyri brotsspark í seinna hálvleiki, segði venjarin, at tað gjørdi hann.

- Sjálvandi skal dómarin ikki fáa alla skuldina, men eg haldi avgjørt ikki, at hann hjálpti okkum serliga væl. Tá støðan var 1-1 helt eg eisini, at skotar fingu óneyðuga nógv fríspark í vandamiklum støðum, men tað er so tað, sum man má læra at liva við.

Og at enda, so kundi venjarin eisini rósa skotunum.

- Sjálvandi hava tit ein kjans í Týsklandi. Hava tit ein góðan dag, sum tit høvdu í dag, so hava tit møguleika móti øllum.

**Mugu skora**

Eftir at hava avgreitt skotsku miðlarnar, gekk Henrik Larsen so niðan til føroysku tíðindafólkini, og hóast hann ásannaði, at nakrir trupulleikar høvdu verið, so kundi hann ikki lata vera við at iðra seg eitt sindur.

- Tað gav okkum nakrar trupulleikar, at vit byrjaðu við 4-3-3. Eg ivaðist ikki í, at teir fóru at spæla 3-5-2, men tað gjørdu teir so ikki, so vit broyttu ístaðin okkara aftur til 4-4-2. Men hóast tað, so fingu vit skapt nakrar møguleikar. So mugu vit bara læra at skora upp á hesar, tí vit vita av, at vit fáa ikki alt ov nógvar av slagnum.

Um valið av Helga L. Petersen segði venjarin, at nýggi maðurin hevði gjørt tað gott.

- Nú hevði hann eina sera strævna uppgávu, har hann nýtti nógvir kreftir fyri at lukka av á kantunum, og tann parturin gekk væl. Hinvegin gekk minni væl, tá langir bóltar vórðu sendir niðan, tí har høvdu teir ein mann, sum er hálvan annan metur hægri enn okkara, so har var ikki tað stóra at gera.

Og eisini hinir báðir nýggju fingu rós frá venjaranum.

- Tór-Ingar ger tað virkeliga gott, og har kemur alt fyri eitt meira ferð á, tá hann kom á vøllin, so tað eri eg avbera væl nøgdur um. Christian spældi so bara einar seks-sjey minuttir, so tað kunnu vit ikki vurdera nakað útfrá, men so hevur hann eisini roynt hesa upplivingina. Og sum umstøðurnar vóru í dag, so haldi eg, at vit allir lærdu nakað frá dystinum, segði Henrik Larsen at enda.

# Sjónvarpsdysturin 6. september

TÍÐINDASKRIV FRÁ SVF

Leygardagin 6. september hevði Sjónvarp Føroya sett beinleiðis sending á skránna frá EM-undandystinum millum Skottland og Føroyar. Sum øllum kunnugt, ið settu seg at hyggja leygardagin, eydnaðist sendingin ikki.

Tøkniliga orsøkin til vánaligu sendingina var tann, at signalið frá fylgisveininum, ið sent var um, var ov veikt.

Sjónvarp Føroya hevði lagt nógv fyri peningiliga og manningarliga fyri at vera til staðar í Skottlandi og lata føroysku hyggjararnar vera við, tá dysturin fór av bakkastokki. Men hetta miseydnaðist orsakað av tøkniligum trupulleikum.

Sjónvarp Føroya gevur øllum hyggjarum sínum eina treytaleysa umbering fyri ta vánaligu tænastu, ið vit veittu leygardagin.

Øll viðurskifti kring sendingina verða nú kannað og øll neyðug stig fara at verða tikin til tess at tryggja, at tað sum hendi leygardagin, ikki endurtekur seg í framtíðini.

B71–VB 1–0 (1–0):

# B71 aftur trý stig

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað hevur gingið alt annað enn væl hjá sandoyingum. Hóttanin um niðurflyting í 3. deild, har besta liðið hjá teimum ikki hevur verið síðani 1987, hevur kenst veruleikanær, men tvær tær seinastu ferðirnar hevur úrtøkan verið góð. Fyrst vunnu teir 1–0 í Leirvík, og sunnudagin vunnu teir í nógvum síðuvindi 1–0 á heimavølli ímóti VB.

Einasta málið kom fimm minuttir undan steðginum. Tað skoraði vongverjin í vinstru, Hanus Clementsen. Hann smekkaði til tvørbólt, sum kom úr høgru, og bólturin fór flatt og dygst inn við nærra stólpanum.

Tað var rættuliga undirhaldandi, og báðir partar kundu havt fingið fleiri mál. VB, sum hevur staðið seg væl, var aftur hesa ferð manningarliga væl fyri. Royndu menninir – eitt nú Boban, sum ikki var við, tá ið besta liðið fekk javnleik á útivølli ímóti HB, Jón Pauli Olsen, Magni Jacobsen, Tórður Holm og Janus Kjærbo – vóru væl við leingi. Fyrstu løtuna eftir steðgin løgdu teir trýst á fyri at fáa útjavnandi málið. Bæði í 1. og í 2. hálvleiki høvdu teir málmøguleikar, og Sigmund Mikkelsen var tætt við at fáa mál, men tað eydnaðist ikki at fáa bóltin framvið Valdemari Noviski.

Fyrr í summar var lítið veiggj í sandoyingum. Hetta tykist heilt øðrvísi nú. Teir stríðast væl, og teir orka at spæla alla tíðina.

Tummas Pauli Olsen, sum var frammarlaga í høgru, var eyðsýndur, og Jónsvein Thomsen hevði besta møguleikan at økja um leiðsluna í 2. hálvleiki. Hann gjørdist einsamallur við Finnboga Olsen, men var so óheppin at detta við bóltinum, áðrenn hann skuldi fara framvið málverjanum.

Næstu ferð skulu sandoyingar til Sumbiar. Í sama umfarinum fer LÍF at fáa vitjan av B68. Sjálvandi vilja B71ararnir helst sleppa undan endaspæli um niðurflytingina. Um tað fer at eydnast ella ikki verður meiri greitt eftir næsta vikuskifti og ikki minst eftir, at B71 í næstsíðsta umfarinum hevur verið á Toftum.

Vágbingar skulu næstu ferð til Klaksvíkar. Felags fyri bæði VB og KÍ er, at teir fyrst og fremst skulu varðveita liðið í deildini, og harnæst stríðast liðini fyri at røkka heiðursmerkjaplássi. VB hevur leingi verið tætt at bronsukrónunum, men eftir tapið á Sandi og AB sigurin á Toftum kámaðist málmurin nakað hjá vágbingum.

**B71–VB 1–0 (1–0)**
1–0: Hanus Clementsen